

*Hendan myndin er helst frá 1896. Her síggjast fólk framman fyri Nýggjustovu og Fútastovu.*



*Niðan gjøgnum Gongina. Vinstrumegin Nýggjastova, høgrumegin Verthúsið og Knútsstova*




*Skotið millum Nýggjustovu og Baianstovu, sum í hesum døgum verður endurbygt við steinseting, sum tað var í gomlum døgum. Tað sigst, at drongurin ovast í myndini er Valdemar Lützen - hann man vera um konfirmatiónsaldur, so myndin man verða tikin tíðliga í 1890'unum.*



*Sandurin sum hann var tíðliga í síðstu øld. Frá vinstru síggja vit við sjóvarmálan kroysurnar í Dali, Dávastova, við Stein og Ísakstova, Fútastova, og Pakkhúsið hjá Carl á Lag, fyrr Lützens Pakkhús.*

oyggjarnar aftur, og í 1893 sigldi hann sína síðstu Føroyaferð fyri at vitja vinir og skyldfólk aftur. Hann ferðaðist runt landið, og allastaðni møtti honum stórur blíðskapur.

Í Havn var hann við til ein fund um »Broyting«, men annars legði hann seg ikki út í tað stríð um skriftmálið, sum tá stóð á. »Broyting« var málfrøðiliga semjan í 1895 millum skriftmálið hjá Hammershaimb og Dr. Jacobsen, sum tó mest líktist stavseting Hammershaimbs.

Áðrenn Hammershaimb fór aftur til Danmarkar, varð boðið til eina stóra veitslu í Havnar Klubba, har fleiri av landsins bestu monnum hildu røðu fyri honum.

Dagurin upprann, tá ið Hammershaimb skuldi fara. »Laura« lá á vágni. Politistarnir buðu sær til at føra Hammershaimb umborð, men so komu løgtingsmenninir og vístu honum ta æru, at rógva hann út til skipið. Ein rúgva av bátum fylgdi, og fólk fór upp á skipið fyri eina ferð enn at siga farvæl. Frá bátinum varð sungið ein yrking eftir Jóannes Patursson:

Vensil legði at Føroya landi
morgun ein so blíðan,
nú vil hann aftur í havið halda,
sigla tann streymin stríða«.

Hetta var seinasta ferð Hammershaimb í Føroyum.

Hann doyði 8. apríl 1909 í Keypmannahavn - 90 ára gamal.

*eirikur@sosialurin.fo*